**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2387, Sp/f Opportuna, 100 Tórshavn.

**Viðtøkur broyttar:** 19.10.2000.
**Nevnd:**
Farin úr nevndini: Regin Joensen, Argjaboðagøta 32 a, 160 Argir, Sigtórur Kaystenson Andreasen, Bjarnoyarvegur 3, 100 Tórshavn, Arne Helmuth Thomsen, Berjabrekka 161, 100 Tórshavn
Innkomin í nevnd: Óli Meinertson Hansen, Millum Gilja 49, 188 Hoyvík.
**Stjórn:**
Farin frá sum stjóri: Sigtórur Kaystenson Andreasen, Bjarnoyarvegur 3, 100 Tórshavn.
Innkomin sum stjóri: Óli Meinertson Hansen, Millum Gilja 49, 188 Hoyvík.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av stjóra, ella av nevndarformanni.

Skráseting Føroya tann 18. desember 2000

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2900, P/F Valhalla, 100 Tórshavn.

**Nevnd:**
Farin úr nevndini:Bo Andersen, Blegdalsparken 110 , DK-9000 Aalborg (formaður).
Innkomin sum formaður: Lena Joan Leivsdóttir, Niðaragøta 76, 188 Hoyvík.
Innkomin í nevnd: Emil Vang, 656 Saltnes.

Skráseting Føroya tann 18. desember 2000

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 1296, **P/F Norðaling, 690 Oyndarfjørður.**

**Viðtøkur broyttar:** 11.09.2000.
**Nevnd:**
Farin úr nevndini: Niels Winther Poulsen, Millum Gilja 8, 188 Hoyvík (formaður) og Fróði Rógvi Nielsen, Postbox 82, 410 Kollafjørður.
Innkomin í nevndina: Jógvan Ziska Djurhuus, Peter Andersensvej 1, DK-9850 Hirtshals (formaður), Bjarte Tunholt, 7 Oak Court Waydon Hill Road GU 98 Fanham UK og Suni Durhuus, Traðarvegur 19, 100 Tórshavn.
**Stjórn:**
Farin frá sum stjóri: Fróði Rógvi Nielsen, Postbox 82, 410 Kollafjørður.
Innkomnir sum stjórar: Suni Durhuus, Traðarvegur 19, 100 Tórshavn, Niels Dann West, Smærugøta 33, 100 Tórshavn og Frímund Hansen, Spógvavegur 39, 100 Tórshavn.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av einum stjóra saman við einum nevndarlimi, ella av einum nevndarlimi.
**Grannskoðari:** Farin frá sum grannskoðari: P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.
Innkomin sum grannskoðari: P/F Grannskoðaravirkið Inpact, R. C. Effersøesgøta 26, 100 Tórshavn.
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka aling, eiga partabrøv í øðrum feløgum, framleiðsla, handil og annað virksemi í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 14. desember 2000

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2243, **P/F Laksaaling Vík, 440 Haldarsvík.**

**Viðtøkur broyttar:** 08.06.2000 og 11.09.2000.
**Kapitalur:** Hækking við kr. 1.000.000,00 til kr. 3.000.000,00
Inngjaldingarháttur: Kr. 1.000.000,00 við skuldarumskifti til kurs 2400.
**Nevnd:**
Farin úr nevndini: Niels Winther Poulsen, Millum Gilja 8, 188 Hoyvík (formaður) og Fróði Rógvi Nielsen, Postbox 82, 410 Kollafjørður.
Innkomin í nevndina: Jógvan Ziska Djurhuus, Peter Andersensvej 1, DK-9850 Hirtshals (formaður), Bjarte Tunholt, 7 Oak Court Waydon Hill Road GU 98 Fanham UK og Suni Durhuus, Traðarvegur 19, 100 Tórshavn.
**Stjórn:**
Farin frá sum stjóri: Fróði Rógvi Nielsen, Postbox 82, 410 Kollafjørður.
Innkomnir sum stjórar: Suni Durhuus, Traðarvegur 19, 100 Tórshavn, Niels Dann West, Smærugøta 33, 100 Tórshavn og Frímund Hansen, Spógvavegur 39, 100 Tórshavn.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av einum stjóra saman við einum nevndarlimi, ella av einum nevndarlimi.
**Grannskoðari:** Farin frá sum grannskoðari: P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.
Innkomin sum grannskoðari: P/F Grannskoðaravirkið Inpact, R. C. Effersøesgøta 26, 100 Tórshavn.
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka aling, eiga partabrøv í øðrum feløgum, framleiðsla, handil og annað virksemi í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 14. desember 2000

Kristin Balle

---


# Til gaman og álvara

TERA
TLF 448888
Postbox 49
600 Saltangará
Tlf. 448888
Fax. 448889
E-post: info@tera.as

Alliance
Thunderbird
900 Mhz



RAM Spectec 128 Mb PC133
Harðdiskur IBM 30 Gb 7200 umdr.
Skermkort Geforce 2 MX 32 Mb AGP 4x
DVD-støð 10x/40x
Modem56 K
Skermur 17" Hyundai
Hátalarar við Subwoofara
Windows ME

Allar teldurnar frá Tera eru samansettar av dygdar komponentum. Dentur verður lagdur á altíð at nýta nýggjastu tøkni, og komponentarnir eru útvældir fyri at fáa haldgóðskuna so góða sum tilber. Tað ger tað léttari hjá okkum at veita eina góða og skjóta tænastu. Eisini eru tær léttar at byggja út so hvørt tørvurin økist.

Nógv programm fylgja við m.a.
Bonus pakkin

Virði kr. 3.000,-

Kontant einans,-
Við MVG
Kr.,- 16.995,-



# Jólatilboð

Við keypi av brúktum bili frá 15/12-31/12

Í 1000 kvm stóru bilhøll okkara eru vit í sonnum jólahýri. Um tú í jólamánaðinum keypir ein av sera góðu brúktu bilum okkara, – hava vit eitt sertilboð.





**Bjóða vit!**
- 3 mðr. garanti
- Píkadekk á felgum -50%
- Ókeypis viðskiftakort frá Shell
- Áljóðandi 5% av bilprísunum*
- Eina lítla jólagávu

* Merkir evt. millumprísir

**P/F Wenzel • við Velbastaðvegin**
**Tlf. 313873**
**Opið 8-17 • mánadag til fríggjadag**

Sosialurin • 311820



bobcat -maskinurnar sum halda!

- **Gravmaskinur** –nógv model
- **Lessarar við óteljandi møguleikum!**

**Vælegnaðar til byggivirkir, entrepenørar, bøndir, jarðarbrúk o.a.**

Keyp góðsku – keyp Bob Cat!



**Kaj Andreasen & Co**
Sandvíkarhjalli - Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820



**Heitlufts-aggregat til flest øll endamál**

- **Refleks oljuovnar til bátin, summarhús o.a.**
- **Hoyggjturkarar til turkan av græsið - serframleitt til Føroysk viðurskifti!**
- **Gasovnar**
- **Hitakanónir**
- **Avfugtarir**

Vit útvega eftir tygara tørvi!

Tosið við okkum!

**Kaj Andreasen & Co**
Sandvíkarhjalli
Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820


# Kunngerð

Søkt verður eftir fólki til at taka sær av ognunum hjá kommununi, at vera eftirlit tá arbeiði verða gjørd í kommununi v.m.

Arbeiði verður fastlønt. Annars fáast nærri upplýsingar við at venda sær til kommunuskrivstovuna.

Umsóknirnar mugu vera skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 29. desember 2000.

Sumba, tann 18. desember 2000

**Sumbiar kommuna**



**Undirvísingar- og Mentamálastýrið**
**Mentamáladeildin**

# Endurlýsing Landsskjalavørður

Av tí at ov fáar umsóknir komu inn til starvið sum landsskjalavørður verður starvið sum landsskjalavørður enn einaferð lýst leyst at søkja. Tann, ið sett/ur verður, byrjar í starvinum 1. mars 2001.

**Uppgávur**
Høvuðsuppgávan hjá landsskjalavørðinum er at vera stjóri í Føroya Landsskjalasavni, sum er stovnur undir Undirvísingar- og Mentamálastýrinum og hevur til endamáls:
- at tryggja varðveitingina av savnindum (skjølum), ið hava søguligt virði og/ella hava fyrisitingarligan og rættarligan týdning fyri borgarar og myndugleikar,
- at gera tað møguligt at vraka savnindi, ið ikki eiga at verða varðveitt,
- at vera ráðgevandi hjá myndugleikum í journal- og arkivspurningum,
- at umsita arkivavtaluna millum landsstýrið og danska statin,
- at hava savnindi tøk hjá myndugleikum og almenningi,
- at veita granskarum og almenningi ráðgeving og savnstænastur
- at inna gransking í tilknýti til søvnini

**Faklig førleikakrøv**
Sett verður sum krav, at umsøkjari, fyri at verða settur í starv, hevur lokna akademiska útbúgving í søgufrøði frá lærdum háskúla á cand.phil.-, cand.mag.-, mag.art-, ella doktarastigi. Harumframt verður sett sum krav, at umsøkjarar hava leiðsluroyndir og kunnleika til savnsarbeiði og at arbeiða við skjølum. Granskingarroyndir innan søgulig vísindi eru ein fyrimunur. Tann, ið sett/ur verður í starvið sum landsskjalavørður, má góðtaka broytingar í setanar- og starvsviðurskiftum sínum í sambandi við møguligar bygnaðarbroytingar á savnsøkinum

**Persónlig førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava leiðsluførleika og -evni, góð samstarvsevni, vera ágrýtin, tænastuhugaður, miðvísur og kunna arbeiða sjálvstøðugt – og vera til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar. Umsøkjarar skulu hava góðan kunnleika til føroyskt mál.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Magistarafelag Føroya.

**Vit kunnu bjóða**
Eitt fakliga krevjandi starv við nógvum avbjóðingum og samstarvi við aðrar stovnar og myndugleikar.

**Nærri upplýsingar um starvið**
Umsøkjarar kunnu seta seg í samband Petur Petersen, aðalstjóra, ella Jákup Thorsteinsson (tel. 355050) fyri at fáa meira at vita um starvið.

**Umsóknir**
Umsóknir við avritum av prógvum o.ø. skjølum, upplýsingum um leiðslu- og granskingarroyndir v.m. skulu vera Undirvísingar- og Mentamálastýrinum í hendi í seinasta lagi mánadagin 15. januar 2001 – og sendast til

**Undirvísingar- og Mentamálastýrið**
**Hoyvíksvegur 72**
**Postrúm 3279 – 110 Tórshavn**
**Telefon 355050 – Fax 355056**
**e-postur: UMMS@UMMS.fo**

Undirvísingar- og Mentamálastýrið hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru málsøki viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frí-tíðarvirksemi.
**Føroya Landsskjalasavn er stovnur undir Undirvísingar- og Mentamálastýrinum. Skrivstova v.m. er í V.U. Hammarshaimbsgøtu 24 í Tórshavn.**




**Almanna- og Heilsumálastýrið**
*Starvsfólkadeildin*

# Sjúkrasystir til føðideildina

Á A2 er starv sum sjúkrasystir á starvsbrøki 0,8 í blandaðum vaktum leyst at søkja til setan 1. mars 2001 ella skjótast gjørligt.

Føðideildin hevur pláss til 16 barnakonur umframt neonatala økið. Deildin er ein áhugaverd deild við nógvum avbjóðingum og góðari upplæring. Á deildini eru royndir og fakliga virknir starvsfelagar. Tann, sum verður settur í starv, hevur góðar møguleikar fyri at mennast bæði persónliga og fakliga.

**Krøv til umsøkjaran:**
- áhuga fyri sjúkrarøkt í obstretrik og neonatal
- roynist væl fakliga og miðvíst góðskumennandi
- góð samstarvsevni

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Sjúkrasystrafelag Føroya.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum verður at senda til

**Almanna- og heilsumálastýrið**
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2, 100 Tórshavn

Nærri fæst at vita um størvini við at seta seg í samband við deildarsjúkrasystrina Anna Jacobsen á tlf 31 35 40 lokal 167 ella Cecilia Vestureið, yvirsjúkrasystir á lokal 127.

Umsóknarfreist: 4 januar 2000, kl. 12.00

# Starvsfólk til Rókina

Á Rókini, ið er bústovnur undir Almanna- og Heilsumálastýrinum, eru 3 fulltíðarstørv leys at søkja frá 1. febr. 2001.

Rókin er ein landsstovnur fyri 5 børn/ung við m.a. skúla- og sosialum trupulleikum.

Vit vænta, at tey, ið sett verða, eru før fyri at arbeiða í sera tøttum samstarvi við bæði vaksin og børn og eru opin fyri nýggjum pegagogiskum avbjóðingum.

Fólk, ið sett verða, skulu hava viðkomandi útbúgving/royndir og verða lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi fakfelag.

Umsóknir við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skulu vera stovninum í hendi í seinasta lagi tann 15. jan. 2001.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Súsan Johansen, fyristøðufólk, á tlf. 318914.

**RÓKIN**
Garðsgøta 31 · 160 Argir